

# Leiðreglur fyri bílegging av kanningum frá ella umvegis rannsóknarstovur í Sjúkrahúsverki Føroya

**Innleiðing**

Rannsóknarstovurnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum gera eina longri røð av kliniskum kanningum innanhýsis, umframt at ávísar kanningar, ið ikki kunnu gerast í Føroyum, verða umbidnar frá kanningarstovum í Danmark. Kanningar verða bílagdar bæði innanhýsis á sjúkrahúsunum, umframt frá kommunulæknum, Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu og serlæknaviðtalum. Farnu árini hevur verið ein støðugur vøkstur í talinum av bíleggingum – umleið 8% -10% vøkstur í tali av kanningum, meðan vøkstur á umleið 18% í bíleggingum.

Rannsóknarstovurnar hava árliga játtan á fíggjarætlanini innanhýsis hjá sjúkrahúsunum. Avbjóðingin hjá rannsóknarstovunum er at kunna hava eina so skynsama nýtslu av játtanini sum gjørligt, soleiðis at hon røkkur til neyðugt virksemi alt árið til størst møguligt gagn. Flestu av bíleggingunum, sum koma frá eindum uttanfyri sjúkrahúsini eru í løtuni uttan avrokning yvirfyri bíleggjaranum.

Endamálið við hesum leiðreglum er at virka fyri, at tilfeingið hjá rannsóknarstovunum verður brúkt optimalt í mun til givnu fíggjarligu-, tóla- og starvsfólkakarmar til besta gagn fyri sjúklingar og heilsuverkið og at stuðla undir góðum sjúklingagongdum. Rannsóknarstovurnar eru tænastueindir fyri heilsuverkið, ið ynskja at veita tænastur á høgum stigi, at verða ein skikkaður samstarvsfelagi og at hava gott samskifti um tænasturnar.



**Bíleggingarskipan /-mannagongd**

Í verandi bíleggingarmótuli í THS ber sum útgangsstøði tekniskt til hjá øllum læknum at bíleggja eitt hvørt slag av kanningum á listanum. Tó so, at fleiri kanningar sum útgangsstøði eru ætlaðar serlæknum á sjúkrahúsum at bíleggja ella at bíleggja í samráð við slíkan. Umhugsað verður at seta eitt frámerki í heitið á kanningini fyri at vísa á, at rannsóknarstovurnar meta, at talan sum útgangsstøði er um eina kanning hjá serlækna á sjúkrahúsi. Rannsóknarstovurnar tilskila sær rætt til í summum førum at venda sær til bíleggjandi lækna og umrøða viðurskiftini.

**Alternativar kanningar v.m.**

Rannsóknarstovurnar tilskila sær rætt til at vísa bíleggjandi læknanum á møgulig betri og/ella bíligari alternativ til gjørdu bílegging ella at spyrja nærri um grundgevingina fyri gjørdu bílegging. Eisini tilskila rannsóknarstovurnar sær rætt til at venda aftur við uppskoti til eina stigvísa eskalering av kanningum.

**Sendiroyndir til kanningar á øðrum kanningarstovum**
Allar sendiroyndir, sum skulu rindast av rannsóknarstovunum, skulu sendast umvegis eina av rannsóknarstovunum, um ikki serligt undantak er gjørt fyri ávísa slagið av kanning. Hetta við tí endamáli at tryggja rætta merking, at tryggja at royndirnar verða sendar til rætta stað og at eftirkannast kann, um goldið verður fyri tað sum bílagt er. Harumframt at tryggja sær, at talan er um kanningar, sum viðkomandi lækni hevur heimild at bíleggja.

Sum frá líður, kemur tað eisini at viðføra, at tað verður gjørligt at fáa flest øll svar inn í THS antin sjálvvirkandi ella sum skannað skjøl. Hetta verður tó ikki altíð gjørt í løtuni av rannsóknarstovunum, av tí at orka og tøkni ikki eru til tess, og tá verða skjølini send við posti.

**Brúka THS**
Allar bíleggingar skulu gerast í THS, undantikið kanningar, har tað ikki ber til, og kunnu tær tá gerast á rætta bíleggingarseðil.



**Kanningar sum ikki eru í THS ella hava verið gjørdar áður**
Hevur serlækni ynski um at fáa nýggjar kanningar við á listan skal umbøn sendast til eina av rannsóknarstovunum við nærri upplýsingum um at fáa kanningina við á listan.

**Prísupplýsing um kanningar**
Rannsóknarstovurnar umhugsa, um tað hevði verið gjørligt at fingið sett kostnaðin fyri allar ella dýrar kanningar inn í bíleggingarskipanina, ella sum alternativ at leggja ein vegleiðandi príslista fyri flestu á teimum dýru kanningunum út á heimasíðurnar hjá sjúkrahúsunum. Støða verður tikin til spurningin í endanum av 2012.

**Heimasíða/vegleiðingar v.m.**
Rannsóknarstovurnar fara at fyrireika til í 2012 at hava øki á heimasíðunum har tilber at fáa upplýsingar um viðkomandi viðurskifti á rannsóknarstovunum, umframt vegleiðingar og leinkjur til viðkomandi tilfar í øðrum londum.

**Pakkabílegging í THS**

Í THS eru møguleikar at velja ymsar kanningarpakkar. Hesir kunnu verða hentir at hava sum valmøguleika, men eigur serligt eftiransni at verða við, um allar kanningarnar eru neyðugar í ávísa førinum. Tað ber til at velja ein standardpakka og síðani at velja óneyðugar kanningar frá. Viðurskiftini viðvíkjandi kanningum, ætlaðar serlæknum á sjúkrahúsi, eru eisini galdandi fyri kanningar í pakkum.

**Biobankaviðurskifti**

Víst verður til faldaran ”Kunning um handfaring av blóð- og vevnaðarroyndum, ið verða latnar til kanningar í heilsuverkinum”. Kann bíleggjast frá Goymsluni á LS ella takast niður á heimasíðuni hjá LS.

**Leiðslan/ábyrgdarhavandi á Rannsóknarstovuni á Landssjúkrahúsinum**

Ann E. Østerø, leiðandi bioanalytikari á Diagnostiska deplinum.
Marius Rasmussen, leiðandi yvirlækni á Diagnostiska deplinum.
Kliniski ábyrgdarhavandi lækni: Bjarni á Steig, leiðandi yvirlækni, Medisinski depilin.
Patologiska deild, Maciej Kaminski, yvirlækni

**Leiðslan/ábyrgdarhavandi á Rannsóknarstovuni á Suðuroyar Sjúkrahúsi**

Sanna Mortensen, leiðandi bioanalytikari
Kliniski ábyrgdarhavandi lækni: Hans Petur Nielsen, yvirlækni



Sjúkrahúsverk Føroya